**VIT HAVA LÆRT OKKUM AT DANSA VIÐ FARSÓTTINI**

**Hvør skipar dansin, um skamma stund, harra Bárður á Steig Nielsen, løgmaður?**




Bardagin hjá tí einstaka millum rættindi, vælmøguleika og sannleika á aðrari síðuni, og á hinari síðuni yvirskipað vald, misnýtsla av valdi, stýring og álitisbrot, hevur eyðkent Kovid tíðarskeiðið.

Vit, sum borgarar í landinum, skulu tískil ikki vera bangnir fyri at staðfesta og gera vart við, at tey sum tóku til sín hesa ábyrgd, at leiða okkum, tjóðina Føroyar, ígjøgnum upprunaliga fráboðaða ódnarveðrið, sum skuldi leggja heilsuverkið lamið, men sum ongantíð kom, og har koppingarevnið og andlitsmaskur **EINANS** hava verið til stóran bága, vóru als ikki vitandi um hvat tey tókust við og tosaðu um. Als ikki, sambært fremstu óheftu serfrøðini á økinum, og staðfestu hetta longu heilt frá byrjan av koppingarherferðini.



**Geert Vanden Bossche**

**First call to WHO: Urgent call to WHO: time to switch gears**
https://www.voiceforscienceandsolidarity.org/videos-and-interviews/urgent-call-to-who-time-to-switch-gears

**Second call to WHO: Please, don't vaccinate against Omicron**
https://www.voiceforscienceandsolidarity.org/videos-and-interviews/second-call-to-who-please-dont-vaccinate-against-omicron

Tó, tað er eingin skomm ikki at hava kunnleika til torgreidd viðurskifti, ein ikki hevur sæð áður, ella arbeitt við, tó tað er ein alneyðug dygd og moralsk skylda, at kennast við og kunna um sínar avmarkingar, tá tað kemur til heilsufrøðiligar spurningar.

Somuleiðis er tað ein dygd og styrki at leita upp og vísa á fremstu serfrøðina, har egnu royndir eru avmarkaðar. Her hevur Heilsuverkið ikki røkt sínar skyldur í so máta, og eru tygara avgerðir, harra løgmaður, tískil, í alt ov stóran mun, litaðar av hesum.

Ivaleyst er tað í Føroyum, eins og í londunum kring okkum, sent út dekret, boðskriv, við leiðreglum um hvussu øll kunning og ráðgeving skal fara fram, men at tygum lata Heilsumálaráðharran, Heilsuverkið og KVF, lata óroynda læknafrøði støðugt koma til orðana, har fremsta serfrøðin, óheft av heiluvágsídnaðinum, er útihúst, er ábyrgdarleyst og átaluvert, ivaleyst eisini revsuvert. Her er neyvan síðsti leikur telvaður.

Til ber ikki at fjala seg aftanfyri eitt møguligt uppáhald, at eingin kunnleiki hevur verið til tær larmandi fráboðanir um skeivu mannagongirnar nýttar eru, tá vit sum leikfólk hava hoyrt fráboðanirnar, frá fremstu serfrøðini, runga úr øllum herðashornum, heilt frá byrjan av koppingarherferðini. Heldur ikki ber til longur at nýta niðrandi vápnið danir kalla ”en hold kæft-bolsje”, konspiratiónsteoretikari, følsk kunning ella villleiðarar.




Ávaringar eru komnar frá háttvirdum og heimskendum serfrøðingum, millum hesi Nobel heiðurskrýndur serfrøðingur á økinum, og øll við lívslongum royndum, og tignaðarligum avrikum, sum tilvitað ikki er lurtað eftir, ella ikki virt og akta, men hinvegin latið læknar, sum ikki vilja kennast við læknalyftið, ja, hava beinleiðis brotið anda Hippocratesar: *”Primum non nocere”/ ”Fyrst og fremst, ger ongum skaða”*, og ikki megna at meta um egnu førleikar sínar, við sera avmarkaðari fakligari vitan um handfaring av alheimsfarsótt, og als ongum royndum, ráðgivið í KVF, á Facebook og í fjølmiðlum annars.


Sjúkan doyr ikki út uttan hópimmunitet

Neyðugt at 85 prosent verða koppsett

09-07-2021

*Hvat byggir tílík ráðgeving á, tá hon er í rungandi andsøgn við tilráðingina frá fremstu vísindini á økinum? Hvør í Heilsuverkinum hevur givið loyvi til tílíkt ábyrgdarloysi? Hvør er grundgevingin fyri 85%?*

*"Tað vit síggja her, harra løgmaður, er eitt ábyrgdarloysi sum røkkur langt út um sólarskipan okkara, og hevði havt lemjandi fylgir fyri allar aðrar fakbólkar í landi okkara, varð tílíkur hugburður nýttur"!*

**Leita eftir sindabukkum**
Hví so hetta skriv harra løgmaður, nú alt sýnist vera hasað av, og vit hava lært okkum at dansa við farsóttini, sum tú málber teg á in.fo. Er so talan um at leita eftir sindabukkum? Nei, so er ikki harra løgmaður, als ikki! Hetta at verða gjørd/gjørdur til sindabukk kenna vit ókoppsettu alt ov væl, nú vit í meira enn eitt ár, m.a. eru skýrd av politisku skipanini og Heilsuverkinum, til at vera orsøkin til at farsóttina ikki fær ein enda.

Tvær týdningarmiklar orsøkir grundgeva skrivið, og verða tær lýstar niðanfyri:

**Fyrst** og fremst er alneyðugt at skipa fyri, politiskt og heilsufrøðiliga, at tað sum fram er farið, á ongan hátt fær loyvi til at endurtaka seg, og annars verður steðga við tað sama. Tað er tygara ábyrgd at seta skjøtul á hetta arbeiði, so skjótt sum til ber, - og áðrenn komandi ódnarstormin!

Tað sum tó hevur bráskund er at skipa fyri einum fevnandi ráði, við altjóða ráðgevum, við neyðugum førleikum, óheftir av heilivágsídnaðinum, at ráðgeva Landsstýri og Heilsuverki komandi tíðarskeiðið. Sambært óheftu serfrøðini er mest sannlíkt, at ein komandi Kovid ódnarstormur er ávegis (WHO lýsir eisini við hesum). Fyrstu hvirlurnar merkjast longu í londunum har ógvuslig koppseting er framd, so sum Ísrael, Australia, New Zealand og Kanada, har øll lond at enda verða rakt. Føroyar, við 76% av fólkinum koppsett, sleppur sjálvsagt ikki undan ódnarstorminum.

Ynskilig er, við hesum skrivi, at kunna tygum um álvarsomu fráboðanina, sum kemur frá fremstu serfrøðini, m.ø. Geert Vanden Bossche. Tygum kunnu tískil ikki siga tygum, ikki at hava neyðuga kunning til at broyta verandi skilaleysu framferð, og fyrireika tjóðina til komandi Kovid ódnarstormin! Heitt verðu somuleiðis á teg um at kunna Landsstýrið og Landsapotekaran um skrivið til tygara, so fyribyrgjandi heilivágur kann fáast til vega skjótast til ber, til at taka, tá fyrstu hvirlurnar taka land. **Hetta hevur bráskund, tá allur heimurin kemur at spyrja eftir hesum heilivági** (*Stig 1: Hydroxychloroquine, Ivermectin. Stig 2: Kortison, Pulmicort, Budesonide*)**!**

***Kunning frá fremstu óheftu serfrøðini um ódnarstormin***:




Til læknar og heilsurøktarstarvsfólk: Krevur ávísan førleika at skilja alt sum borið verður fram, men øll skilja álvarsemið í boðskapinum, og hvør hesin er, somuleiðis hvat eigur at vera framt við tað sama av fyrireikingum: https://www.voiceforscienceandsolidarity.org/videos-and-interviews/the-highwire-interview-the-vanden-bossche-warning



Í stóran mun sami boðskapur sum omanfyri, borin fram so vit øll skilja hann:

https://rumble.com/v155h7f-dr.-geert-vanden-bossche-ade-who-pandemic-treaty-and-expected-excess-deaths.html

**Onnur** orsøkin er hon, at dansurin við farsóttini, sum tygum lýsa á portalinum in.fo, er júst byrjaður! Nakrar av avleiðingunum av henni, sambært fremstu óheftu serfrøðini, m.ø. Nobel heiðurskrýnda Prof. Luc Montagnier, verða lýstar í stuttum í videobrotunum niðanfyri.

Verandi ráðgevar tygara fara neyvan at kennast við verandi skilaleysu ráðgeving, og teirra fakliga hjálparloysi. Og heilivágsídnaðurin slakar ikki, aldrin, men vil herða herrópini, koppset, koppset og aftur koppset.

Júst hetta, at lagt hevur verið eftir teimum ókoppsettu, sum verandi orsøkina til at farsóttin ikki fær ein enda, staðfestir hvussu stórt fakliga hjálparloysið hevur verið.

Fylgja tygum tó framhaldandi verandi ráðgevum tygara, gerst tað sjálv Gívurin við Snjóhvítu-mRNA-súreplinum, sum skipar dansin, - hon sum við ymiskum snildum, ræðslu og háttanum, hevur givið 76% av føroyingum eitt mRNA-súrepli.

Úrslitið er, at omanfyri 76% av føroyingum nú hava eitt øðrvísi DNA, ”uppskrift uppá lívið”, enn støðan var áðrenn koppingarherðferðina.  Óhefta vísindin hevur staðfest, at Spike proteinið endar í kyknukjarnuni, har tað gerst partur av DNA stronginum, og m.a. sýnist vera til ampa fyri lívsneyðugu rættingunum av DNA stronginum, sum tørvur er á, støðugt!




Nobel Price winner Prof Luc Montagnier speaks at the Luxembourg Parliament on covid vaccine danger

Her tosar Nobel heiðurskrýndi Prof. Luc Montagnier (1932-2022), í Parlamentinum í Luxembourg, um vandarnar við Kovid koppingarevninum: ”Talan er ikki um veruligt koppingarevni, men um eitur”. Langtíðarárinið kann gerast ræðandi.

Hví verður tílík hoyring ikki skipað í Føroyum, harra løgmaður? – tá vit vita at verandi ráðaloysi kann beina fyri viðbreknu tjóð okkara, - so sum vit kenna hana í dag!?

https://rumble.com/vupdee-nobel-price-winner-prof-luc-montagnier-speaks-at-the-luxembourg-parliament-.html

**Koppseting av børnunum**




*Barnalæknarnir á Landssjúkrahúsinum mæla til, at børn í aldrinum 12 til 15 ár verða koppsett fyri koronu, boðar Heilsumálaráðið frá.*

Hvør hevur ábyrgd av at tílíkt hjartanemandi tilmæli verður snikka saman, og hvør er grundgevingin? Hvør tekur ábyrgd av at hetta verður framt í verki? – ein gerð sum óhefta serfrøðin metir sum **brotsverk**? Verður eftirkannað um brotsverkið skal hava fylgir, tá talan er um álvarsamt brot á læknalyftið, harra løgmaður?




Her lýsir Prof. Luc Montagnier hvat tygum, harra løgmaður, standandi við stýrisvølin, hevur latið Heilsuverkið skipa fyri, til ræðandi ampa fyri komandi ættarlið av fámentu og viðbreknu tjóð okkara!

https://rumble.com/vhsm3h-nobel-laureate-luc-montagnier-warns-covid-vaccine-may-lead-to-neurodegenera.html




Dr. Robert Malone, mennarin av mRNA og DNA koppingartøknini, sum er nýtt til menning av Covid-19 ”koppingarevninum”, kemur her við álvarsamari ávaring um koppseting av børnum við mRNA ”koppingarevninum”.

https://rumble.com/vqq7gc-dr.-robert-malone-before-you-inject-your-child.html



Geert Vanden Bossche: Tað kann á ongan hátt verða rættvísgjørt at koppseta børn. Frá einum immunilogiskum sjónarhorni er talan um **fullkomi vitloysi**. Tað er surrealistiskt at hetta verður hugsað sum ein møgulig loysn. Vit vita at børn eru væl vard ímóti hesum virus. Eg dugi ikki at síggja nakran fyrimun, hvørki fyri barnið ella fyri fjøldina, skulu vit náa fjøldimmunitet. Hetta er **kriminelt! -** eg finni ikki orð fyri hesum! Mítt tilmæli til øll foreldur er, ”***tú skalt undir ongum umstøðum lata barn títt kovid koppseta***”!

https://rumble.com/vt2kkp-part-1-children-vaccination-english.html

Harra løgmaður, hví er kunningin frá Montagnier, Malone og Bossche ikki viðgjørd alment, og borin foreldrum og annars tjóðini allari, umvegis KVF?

**”So be it” hugburður, - eisini á heilsuøkinum?**
Sum vit síggja á myndini niðanfyri, harra løgmaður, so letur politiska skipanin, føroya fólk luttaka í einum royndarátaki, - vit kunnu ivaleyst kalla tað, eitt ”***So be it – eksperiment***”, sum skal renna fram til 2023, uttan at hava hóming av hvørji langtíðarhjáárin hetta vil hava við sær fyri 76% av føroya fólki, - og Heilsuverkið og politiska skipanin loyvur hesum!




[https://www.canadiancovidcarealliance.org/wp-content/uploads/2021/12/The-COVID-19-Inoculations-More-Harm-Than-Good-REV-Dec-16-2021.pdf](https://www.canadiancovidcarealliance.org/wp-content/uploads/2021/12/The-COVID-19-Inoculations-More-Harm-Than-Good-REV-Dec-16-2021.pdf)

**Heilsuverkið hevur í KVF góðskustemplað eksperimentið!**
”Tað er einki at óttast”, sigur Bjarni á Steig, yvirlækni. Hann vísir á, at koppingarevnini eru væl kannað frammanundan, og hann ivast ikki í at taka tað sjálvur. Somuleiðis vísir hann á, at myndugleikarnir fara at kunna meira um koppsetingarevnið komandi tíðina”.

Harra løgmaður, hvussu skal tað skiljast, tá sagt verður, ”at koppingarevnini eru væl kannað”? - og hví er ikki kunnað um koppsetingarevnið, so sum lovað?

Harra løgmaður, er omanfyristandandi ikki at meta sum eitt óhugnaligt ábyrgdarloysi frá okkara Heilsuverki? – er hetta ikki ***Kriminelt***, eins og Bossche lýsir tað? - og hevur politiska skipanin onga ætlan um at ábyrgda tey sum hava skipað fyri hesum?



Her verður einans nert við ein lítlan brotpart av teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman, bæði fyri politisku skipanina og Heilsuverkið. Tískil er neyðugt, at tikið verður samband við óheftu serfrøðina, við fakligum førleikum og áralongum royndum á økjunum “virologi, immunologi, vaccinologi, evolutionerari biologi, og epidemilogi, eitt nú Geert Vandeen Bossch, so løgd verður ein skipað ætlan fyri viðgerð av børnum og barnabørnum okkara, sum tit hava fingið koppsett við snildum, ræðslu og háttan, uttan fullgóða kunning og neyðugt samtykki, - sum sjálvsagt er revsuvert!

Vónað verður við hesum, harra løgmaður, at hoyra frá tygum alment, har tygum viðgerða evnini lýst omanfyri!

Annars, at fáa lýst hvørji hjálparátøk verða framd fyri at hjálpa teimum sum eru skadd av Kovid koppingarevninum. Og hvørji átøk verða framd, at verja tey koppsettu, nú óhefta serfrøðin ávarar um ein komandi “Kovid ódnarstorm”!?

Víst verður annars til viðlagda skrivið niðanfyri: Alment skriv til foreldur og barnalæknar um Kovid koppseting, Robert M. Rennebohm, MD

*Vinarliga Mourits M. Joensen*
*Ókoppsettur, pápi og abbi, við skerdum borgarligum rættindum,*
*vegna manglandi førleikar í Heilsuverkinum!*

---

**Alment skriv til foreldur og barnalæknar um Kovid koppseting**
Robert M. Rennebohm, MD

Hægstu raðfestingar undir Kovid alheimsfarsóttini eru, at verja tey veiku, og veita okkara sakleysu børnum eina so heilsutrygga framtíð sum til ber.

Gevur Kovid koppsetingin hinvegin teimum sakleysu børnunum eina heilsutrygga framtíð, og verjur hon tey veiku? Ella vildi ein onnur tilgongd til alheimsfarsóttina givið børnunum eina betri framtíð, og givið teimum veiku eina betri verju?

**Vit høvdu havt stórt gagn av**, um Eugene Smith framvegis var millum okkara í dag, so hann kundi greitt frá menniskjaligu líðingunum, knýttar at Kovid alheimsfarsóttini, og kundi hjálpt okkum at merkt, hugsa um, skilt, og í felag loyst Kovid støðuna.

*Teksturin niðanfyri er stuttur samandráttur úr almennum skrivi frá Robert M. Rennebohm, MD. Sí annars rúgvismiklað skrivið í fullari longd á leinkjuni her:*

https://www.voiceforscienceandsolidarity.org/scientific-blog/an-open-letter-to-parents-and-pediatricians-regarding-covid-vaccination

**Inngangur**
Tvær áskoðanir hava verið ráðandi, tá ræður um at lýsa støðuna kring Kovid koppseting.

Ein er: Koppset teg við tað sama! Koppsetingin er vegurin út úr alheimsfarsóttini!
Onnur er: Steðga koppsetingarherferðini við tað sama! Kovid koppsetingin er vandamikil og ger alheimsfarsóttina bert verri.

Hesar lýsingar, sum peika í hvør sína ætt, hava skapt órógv og angist hjá foreldrum og mongum barnalækna. Almenna skrivið (í fullari longd, sí leinkjuna) hevur til endamáls at hjálpa foreldrum og barnalæknum, sum einfalt ynskja at gera tað sum rætt er, at skilja vísindini aftanfyri tær ósambærligu lýsingar, og velja besta framferðarháttin kring Kovid koppseting av børnum.

**Kunnandi samtykki**
Børn hava ikki nakra rødd ella møguleika fyri støðutakan, tá tað kemur til Kovid koppseting. Børn eru fult og heilt bundin at skilagóðu avgerðini hjá foreldrum sínum, sum skal byggja á álítandi vitan. Etiskt, skal heilivágur, serstakliga koppingarevni, sum er á royndarstøði, og tikin í nýtslu í skundi, uttan nøktandi trygdarroyndir, ikki gevast nøkrum, fram um alt ikki børnum, **<u>uttan samtykki</u>**, **<u>sum byggir á fullgóða kunning!</u>**

**Barnalæknar eru løgfrøðiliga og moralskt bundnir, at virða aðalregluna um "kunnandi samtykki", og bera so í bandi, at foreldur eru fultgott kunnaði, áðrenn hesi svara játtandi, at barn teirra kann koppsetast!**

*"Eg havi roynt at lata sannleikan vera mítt hugahaft"*

W. Eugene Smith, myndatíðindamaður (1918-1978)



***W. Eugene Smith** var evnaríkur og samkenslufullur myndatíðindamaður, sum legði største dentin á at lýsa viðurskifti, sum góvu honum trega, so sum kríggj, fátækradømi, órættvísi, líðingar og manglandi heilsurøkt.*

*Hann søkti fyrst og fremst sannleikan, og longsil hansara var eftir "samfelagsligum vakurleika".*

*Um arbeiði sítt segði Eugene Smith: "Við djúpasti sálarrannsakan, evni míni makta, hevur sannleikin verið mítt hugahaft"*

*"Kann eg fáa teg at hugsa, fáa teg at føla, fáa teg at síggja, so havi eg gjørt alt eg evni sum lærari"*

---



John D. Abramson, M.D.
Harvard Medical School

"Fyrst av øllum mugu vit sleppa heilaspunanum um, at nútíðar gransking framd av heilivágsídnaðinum, hevur til endamáls at betra um heilsu okkara, á gagnligan og munadyggan hátt.

Tað er okkara áskoðan, at vinnuligt stuðlaða heiluvágsgranskingin, fyrst og fremst hevur til endamáls at økja um úrtøkuna av íløguni, og er ikki framd við heilsu okkara fyri eyga"

---

Upplýsingarnar og ekkin, lýstur í hesum almenna skrivi, fevnir um kunning, sum er avgerandi fyri, hvørt foreldur, við støði í álítandi vitan, kunnu taka støðu, og geva samtykki til, at barn teirra kann Kovid koppsetast.

Foreldur, eg biði tykkum fyrigeva at skrivið er so langt, men Kovid koppingar-trupulleikin er torgreiddur, og hevur tørv á at verða viðgjørdur sum so. Vitanin kring ”immunologi og vaccinologi” er týdningarmikil her. Fyri títt, og onnur børn við, er tín avgerð sera týdningarmikil, tískil gev tær vinarliga tíð at lesa skrivið (sí leinkjuna omanfyri til fulla skrivið). Um ikki, er umráðandi at tú lesur samandráttin niðanfyri.

Sum barnalækni við nærum 50 ára royndum, so hevur kunningin, fráløran til foreldur, altíð verið týdningarmikil fyri meg. Undrunarverd eru evni foreldrana at skilja torgreidda heilsufrøðiliga kunning, serstakliga tá talan er um heilsustøðuna hjá børnum teirra. Tí eri eg sannførdur um at tú sum foreldur, hevur førleika at skilja høvuðsboðskapin í hesum skrivi.

**Samandráttur - stutta útgávan av mínum almenna skrivi**
**Inngangur**

- Tvær høvuðsáskoðanir hava verið ráðandi, tá tað ræður um at lýsa støðuna kring Kovid koppseting. ”**Høvuðsboðskapurin” hevur verið** (frá teimum sum eru sloppin til orðana alment*), - koppset teg við tað sama! Koppsetingin er vegurin út úr alheimsfarsóttini! ”**Hin boðskapurin” hevur verið** (frá teimum óheftu sum ikki eru sloppin til orðana alment*), - steðga koppsetingarherferðini við tað sama! Kovid koppsetingin er vandamikil og ger alheimsfarsóttina bert verri.
- Tíverri hevur lítið og einki gevandi vísindaligt samskifti verið millum partarnar, tó serfrøðin sum hevur tosað fyri at steðga koppsetingini, javnt og samt hevur heitt á ”høvuðsboðberan” um samstarv.
- Boðskapirnir báðir, sum eru í mótsøgn hvør við annan, hava skapt rumbul og angist hjá foreldrum og barnalæknum, sum veruliga ynskja at gera tað rætta. Tað hevur eisini skapt split alment, og í familjum.
- Almenna skrivið her, er ein roynd at greina vísindini aftanfyri Kovid koppingartrupulleikarnar, og skapa eitt sunt og fevnandi samskifti, har vit savnast og greina hvat vil vera best fyri børnini og okkum øll sum heild.
- Kunningin og ekkin, sum er lýstur í almenna skrivinum, umboðar kunning sum er neyðug, skal foreldur taka støðu, grundað á álítandi vitan, áðrenn foreldur samtykkir at barnið verður koppsett.

Kunning: Omanfyri 1000 tilvísingar, til neyvari kunning, eru at finna í fullu frágreiðingini.

**1. partur – Tveir ósambærligir boðskapir**

- **Høvuðsboðskapurin**, framdur av CDC og ”US Covid Task Force” er, at Kovid koppingarevnið er trygt, virkið og neyðugt. Boðskapurin er, at alheimsfarsóttin er vorin ein ”farsótt millum tey ikki koppsettu”. Øll heimsins menniskju skulu koppsetast við tað sama, við nøkrum fáum undantøkum, fyri soleiðis at verja mannaættina. Kovid koppingarevnið er vorið ein moralsk og sosial ábyrgd hjá øllum borgarum. Um tú ikki letur teg koppseta ert tú egoistiskur og sosialt ábyrgdarleysur. Hin boðskapurin, greinaður niðanfyri, verður lýstur sum skaðilig villeiðing.
- **Hin boðskapurin** er, at alheimsfarsóttin, er vorin longd og gjørd vandamikil, **ikki** orsaka av at nøkur ikki lata seg koppseta, men orsaka av meiningsleysari fjøldkoppseting, har nýtt verður eitt ikki-



Christine Stabell Benn
Klinisk Professor Syddansk Universitet

”Tað er at vóna at Kovid koppingarevnið er eins lítið skaðiligt, og tað er nýtiligt sum koppingarevni.”

-----------------------------------------------

**Skelkandi boðini frá okkara HEILSUMYNDUGLEIKA!**



Við snildum, ræðslu og háttan – ”Koppset teg”!
Tað kann bjarga tínari ommu,
tínum pápa og tínum granna!

Gert tú ikki tað, so kanst tú beina fyri tínari ommu, tínum pápa og granna, - er tað boðskapurin Heilsu-verkið ynskir skal blæsa í vindinum?

Sambært óheftu vísindini, sum ikki sleppur til orðana alment, eru boðini: Børn mugu ikki Kovid koppsetast, - tað er at skilja sum ein **BROTSGERÐ**!

Hinvegin so eru boðini frá KLF/Kommunulæknafelag Føroya, sum harmast almikið, at vit í Føroyum eru afturút við at geva 3. prikið, og at onki barn 5-11 ár enn hevur fingið 1. prikið.

**Koppseting sum søluvøra!**




Koppseting sum blind ísakøld søluvøra!
Hvør umboðar hvønn her, og hvat er endamálið?

Og eingin talar at, ella setur spurnartekin við hjartanemandi og vitleysa atburðin!

-----------------------------------------------

steriliserandi (suboptimal) koppingarevni, sum ger størri skaða enn gagn. Boðskapurin umboðar sunnar og djúphugsnar vísindaligar grundgevingar, mentar og lýstar av úrmælingum, dugnaligum og umsorgarfullum vísindamonnum/-kvinnum og læknum, sum hava vígt yrkisleið sína til menning- og nýtslu av koppingarevnum, og nýtt alla tíð sína, teir síðstu 22 mánaðirnar, til gransking av verandi Kovid støðu.

- **Hin boðskapurin**, við støði í vísindi, mælir til at fáa steðga verandi fjøldkoppseting við tað sama, tá Kovid koppingarevnið ikke er trygt at nýta, ikki hevur neyðugt virkni, og ger skaða á menniskju, bæði tað einkulta og fjøldina. Kovid koppingarevnið eigur als ikki at verða givið børnum.

**2. partur – Lýsing av immunverju okkara**

Immunverjuskipanin kann býtast sundir í tvey høvuðsøkir/-deildir, Slímhinnu Immunverju Skipanin og Reglubundnda Immunverju Skipanin. Dr. Bhakdi hevur víst á at nýta myndatalu úr hermegini, flogvápnið => (slímhinnu immunverju-skipanin) og herflotin => (reglubundnda immunverjuskipanin).

- Flogvápnið við flogvallastøðum, staðsettar í trygdarnetinum av fibrum undir slímhinnuni, í maga- og tarmleiðini, og øðrum slímhinnugøgnum, so sum bløru og lívmóður
- Herflotin hevur herflotastøðir runt um í restini av kroppinum, í lymfuknútum, milti, mergi í beinagrind, í æðraleiðini og gøgnum annars
- Bæði flogvápnið og herflotin hava eitt viðføtt- og eitt lærandi immunitetsbýti.




Okkara immunverja fer vísiliga til verka, tá ræður um at greina eitt virusálop. Hugt verður ikki einans eftir einum ávísum liði, fyri síðani at gera eitt mótevni fyri júst hesum, so sum gjørt er við Kovid koppingarevnið við sínum Spike proteini. Hugt verður hinvegin eftir øllum viðkomandi liðum, og verða mótevnir gjørd móti øllum hesum liðum. Nýttir verða allir immunvápnaførleikar, so sum viðføddi- og lærdi immunvápnaførleikin. (Hetta hevur týdning, skal bera til at eyðmerkja, og berja niður, eitt muterað virusfrábrigdi*)

- Slímhinnuimmunskipanin framleiðir immunglobin IgA, sum verjir móti infektiónum, sum stava frá bakterium og virus, og koma inn umvegis op í kroppinum, so sum luftvegir og tarmskipan. Reglubundna immunverju-skipanin framleiðir ikki immunglobin IgA
- Fyri verjuskipaninar er galdandandi, at flogvápnið, við viðføddum verjueginleikunum er fremsti verjugarður, og fremur fyrsta mótálopið, við viðføddum dreparakyknum (NK-kyknur) og viðføddum andevnum.

**Heilsuverkið** hevur brotið fyrstu grundreglu, tá ræður um fjøldkoppseting og fjøldimmunitet, knýtt at einari alheimsfarsótt, sum tískil staðfestir, at eingin førleiki er innan føroyska heilsuverkið, tá ræður um skipaðan kunnleika, sum fevnir um "virologi, immunologi, vaccinologi, evolutionera biologi og epidemilogi" (- og neyvan nakar krevur tað heldur!).

Fyrsta grundregla sigur:
Tú mást undir ongum umstøðum

- fjøldkoppseta,
- undir alheimsfarsótt, tvs. ímeðan farsóttin herjar,
- við koppingarevni, sum ikki forðar fyri smittu (Kovid koppingarevnið forar ikki fyri smittu)
- tá hetta hevur við sær, at tey koppsettu ikki kunnu gerast partur av teimum sum skulu berja niður virusið, og menna fjøldmótstøðuføri, sum er einasti háttur at basa farsóttini, í verandi støðu - hinvegin menna tey koppsettu **virusbølmennir**, sum úrslit av hesum!

Fremsta óhefta serfrøðini lýsir tað sum framt er, sum "**A COLOSSAL BLUNDER**"!

Ikki at hava neyðugan førleikan til eitthvørt, kenna vit øll, men ikki at vera førur fyri at meta um-, ella ikki vilja ásanna, at so er, er ræðandi, - serliga tá talan er um heilsuvíðurskifti, sum raka alla tjóðina.

---

## Kovid koppingarherferðin - samandráttur

1) Koppingarevni, sum ikki forðar fyri mildari sjúku (tey koppsettu gerast sjúk), kann ikki forða fyri álvarsamari sjúku, sigur óhefta vísindin!

Umframt at tað sýnist sjálvsagt, so hevur tilgongdin prógvað tað!

(Eitt sera løgið trygdarbelti Heilsuverkið hevur givið teimum koppsettu, sum ongan virknað hevur, koyrir tú undir 80 km/t, men koyrir tú omanfyri 80 km/t verður tú neyvan illa løstaður)!

2) Koppingarevni, sum ikki forðar fyri smittu, kann ikki skapa fjøldimmunitet, har fjøldkoppseting fer fram undir einari alheimsfarsótt, sigur óhefta vísindin, og hevur tilgongdin prógvað tað.

3) Grundgevingin fyri at øll, eisini børn, skuldu koppsetast, og ikki einans tey sum vóru mett at vera í vandabólki, sum upprunaliga var í uppskoti, var júst hon at fáa ment fjøldimmunitet. **MEN júst tað ber ikki til við verandi Kovid koppingarevni!**

Heilsuverkið hevur skyldu til at grundgeva fyri, hví skipað er fyri einum átaki, sum ikki hevur festi í vísindi, borið fram av fremstu serfrøðini, - og sum á ongan hátt er møguligt at eydnast? Vónandi verður svarið ikki at blæsa í vindinum allar tíðir?

4) Sambært serfrøðini eru tað júst tey ókoppsettu sum koma at "bjarga" ommunum, pápunum og grannunum, nú komandi herrópini "koppset, koppset, koppset" fara at gjella um dalar og fjøll, - ivaleyst um allan heim.

Metir flogvápnið at tað gerst neyðugt við hjálp frá herflotanum, sendir flogvápnið boð um hjálp. Nú verður næsti verjugarður nýttur, sum byggir á førleikar sum verða tilognaðir, vunnir í vápnaleiki, lærdir immunførleikar.

- Til tíðir er einans tørvur á at seta inn flogvápnið, eitt nú tá talan er um virusálop umvegis nøs og munn. Av og á er einans tørvur á herflotanum, men til tíðir kann vera tørvur á mótálopi við báðum skipanum, skal virusálopið berjast niður.
- Samanumtikið, tá vit verða álopin av SARS-CoV-2 virus, so verður gjørt brúk av báðum verjuskipanum, Flogvápni og Herflotanum, fyri við tað sama at berja niður álopið. Tann lærandi parturin av immunskipanini tekur og greinar virusið til fulnar, so eitt komandi álop, tó virusið er muterað, verður avdúkað og bart niður.
- Til samanberingar gevur Kovid koppingarevnið Reglubundnu verjuskipanini eitt sera avmarkað ”avrit” av virusinum, sum einans fevnir um Spike-proteinið. Reglubundna skipanin er tískil illa kunna um fíggindan, broytir hesin útsjónd og herlist. Vit vita ikki um viðføðda verjuskipanin verður kunna á nakran hátt.
- Í dag kann ein loyva sær, av røttum, at seta spurnartekin við, hvørt Kovid koppingarevnið órógvar viðføddu immunverjuskipanina, og á skaðiligan hátt órógvar natúrligu og skipaðu immunverjuna, - vit kunnu kalla hana menniskjaligu vistfrøðiskipanina.
- Tað er skilagott at hugsa um immunverjuskipanina sum eina framúrskarandi samansetta vistfrøðiskipan, eins og vit kenna náttúrunar vistfrøðiskipan, og sum vit vita er samansett og viðbrekin. Sama er galdandi fyri immunverjuskipanina, tískil skal hon ikki viðfarast við fyrilitaleysum lokabrøgdum.
- Týðandi vísindalig prógv eru fyri, at náttúrligi lærandi immuniteturin er munandi meira virkin og haldgóður enn immuniteturin, Kovid koppingarevnið kann geva einum.

## 3. partur – Hvat hendir um alheimsfarsótt sum rakar andaleiðina, eins og Covid farsóttin, IKKI verður handfarin við fjøldkoppseting?

- Um vit **ikki** viðgerða alheimsfarsóttina við koppingarevni, so sum gjørt varð, fyrsta árið við Kovid farsóttini, tí einki koppingarevni var tøkt, so var tað fyri stóran part fólk undir 60 ár, sum vóru og ferðaðust, sum vóru smittaði við virus SARS-CoV-2.
- Tey mest viðbreknu, eitt nú eldri, skulu verjast við umhugsni, móti virus smittu.
- Tey, sum verða virus smittað og fáa sjúkueyðkenni, skulu hava málrættaða viðgerð við tað sama, langt skjótari en gjørt varð undir Kovid farsóttini.
- Tey sum verða smittað, og koma seg, menna natúrligan og sterkan steriliserandi immunitet, sum stuðlar undir menning av fjøldimmuniteti.
- Jú sterkari náttúrligi lærandi immuniteturin gerst, hjá teimum sum koma seg eftir sjúku, og sterkari viðføddi immuniteturin er hjá øllum hinum, skjótari verður fjøldimmunitetur mentur, og sterkari gerst hann.
- Tá ein høgur procenpartur av fjøldini hevur ment fjøldimmunitet (mótstøðuføri) móti virus, hevur virusið trupult at finna ein at smitta, sum ikki longu hevur ment immunitet. So hvørt immuniteturin økist, verður farsóttin bard niður, og hon fjarar burtur.
- Ein natúrlig gongd fyri eina virus-umfarssótt, sum rakar andaleiðina, er hon, at hon fjarar burtur eftir bert fáar mánaðir. Orsøkin er hon, at har mennist eitt veksandi og sterkt steriliserandi mótstøðuføri.

*Kann tað hugsast at Heilsuverkið kemur út við einari greining av hví tey ókoppsettu vóru mett at vera ein háttan? - og um lagt verður á annan bógv hesaferð?*

*Vit, ókoppsettu, hava annars ikki tørv á einari umbering, men hava uppiborðið at fáa somu borgarligu rættindi, og øll onnur búsitandi í Føroyum.*

*Hvørt ein umbering er nøktandi, til tey mongu við skaða eftir Kovid koppsetingina, vil tíðin leggja á blik.*

*Koppingarherferðin verður lýst av fremstu óheftu serfrøðini, sum verandi óneyðug, ja skilaleys, - og brot á alla siðvenju!*

------------------------------------------------

**PFIZER SKJØL**



**1. marts 2022 leysgav FDA 12.000 Kovid-19 skjøl, áleið 55.000 síður. Av teimum eru 9 tættskrivaðar síður við hjáárinum og varandi sjúkum av Pfizer koppingarevninum**

Sí tær 9 síðurnar her, síðurnar 30 til 38 í skjali: 5.3.6 postmarketing experience.pdf
https://phmpt.org/pfizers-documents/

FDA hevur givið út skjøl, ja hópin av skjølum. 1. marts 2022 vóru 55.000 síður leysgivnar, og frameftir skulu leysgevast 55.000 síður hvønn mánaða, samanlagt áleið 300.000 síður.

Her verður m.a. kunnað um álvarsom hjáárin og varandi sjúkur av Pfizer koppingarevninum. Ætlanin var at krógva tey í 75 ár, so tú og eg ikki skuldu síggja tey. Og hví kanst tú spyrja? Dómsvaldið vildið tað tó øðrvísi.

Tey liggja alment frammi, og er tað ikki tespuligur lesnaður. Boða verður frá hvussu nógv eru dripin og løstað, fyri ikki at tosa um tey mongu sum koma at liggja í súginum, tá ringastu brotini hava lagt seg.

Og tey sum av røttum skuldu granska og greina skjøluni fyri okkum, eru sum sokkin í jørðina, - har er deyða tøgn! Hvar er Heilsuverkið? Hvar er KVF? - og hvar eru fjølmiðlarnir annars?




Er talan um eitt dekret, skommin, ræðslan, ávís áhugamál, … sum hevur tept tey? Ræðandi hvør enn orsøkin er!

------------------------------------------------

- Tað er av týdningi at skilja, at fjøldimmunitetur, umvegis nátúrliga smittu, er munandi sterkari enn immunitetur náddur við fjøldkoppseting, og við koppingarevni sum ikki er steriliserandi, framd undir einari alheimsfarsótt. Í roynd og veru so órógva tær menning av fjøldimmuniteti. Meira um hetta seinni.
- Fjøldimmunitetur sum, so við og við, verður mentur undir farsótt, verjur øll. Samstundis vilja skilagóð átøk kring reinføri og verju, umframt ágangandi viðgerð, avmarka innleggingar og deyðsføll.
- Avgjørt eru innleggingar og deyðsføll at harmast um. Hinvegin vil handfaringin, við nýtslu av fjøldkoppseting undir einari alheimsfarsótt, sum ikki forðar fyri smittu, vera orsøk til munandi fleiri innleggingar og deyðsføll. Hetta verður lýst neyvari í 4. parti.

**4. partur – Hvat hendir um alheimsfarsótt, so sum Kovid almeimsfarsóttin, yvirskipað verður viðgjørd við fjøldkoppseting, har hendan IKKI verjum móti smittu?**

- Nuverandi Kovid farsótt er yvirskipað vorin greidd við skjótari hóp-koppseting, tvørturum allar aldursbólkar, við koppingarevni, sum ikki forðar fyri smittu, og sum einans hyggur eftir Spike-proteininum. Hetta verður framt samstundis sum farsóttin herjar og samfeløg verða læst niður og borgarin avbyrgdur.
- Heldur enn at nýta fult og heilt steriliserandi koppingarevni, sum drepur virusið, og forðar fyri smittu, so var koppingarevni nýtt, sum ikki hevði hendan eginleika. I besta føri megnar tílíkt koppingarevni einans at taka broddin av sjúkuni.
- ***Tey sum ikki sluppu til orðana alment, høvdu mælt til at nýtt Kovid koppingarevni við optimalum eginleikum, men tílíkt koppingarevni hevur ongantíð verið tøkt.***
- Sambært royndu serfrøðini innan virologi og koppseting, so er uppskriftin til eina vanlukku, júst hon sum er vorin nýtt, har fjøldkoppseting fer fram, við ikki steriliserandi koppingarevni, sum tískil ikki hevur evnini at steðga smittu. Orsøkin er hon, at koppsettur við koppingarevni við hesum eginleikum, gevur loyvi til at virusið fer inn í kyknurnar, verður margfaldað har og spjatt til onnur, og -
- Tá virusið margfaldast í kyknuni hjá koppsettum, mennast nýggjar mutatiónir. Hesar vilja, undir trýsti frá fjøldkoppseting, umframt eyka trýsti frá afturlatingartiltøkum, megna at sleppa undan teimum mótandevnum, sum koppingarevnið skapar, og vilja tær økja um smittuvandan. Tá mótandevnið, koppingarevnið skapar, viknar skjótt, gerst einfaldari fyri nýggju virus-frábrigdini at koma inn í kyknurnar, frábrigdini margfaldast lættari, smytta verri enn fyrra virusið, og kunnu gerast eitt ráðandi frábrigdi av teimum mongu.
- Umframt stúran um, at Kovid fjøldkoppsetingarátakið vil viðvirka til at virusfrábrigdini menna mótstøðuføri (vaccineresistens) og smitta ógvusligari, so er vandi fyri, at ment verður dreparavirus, sum rakar øll, koppsettur ella ikki, - eisini børn.
- Sjálvt um øktur illkynjaður ikki kemur fyri, so kann Kovid sjúka gerast alt meira lívshættislig, orsaka av at koppingarevnið økir møguleikan hjá virus at treingja inn í kyknurnar (vaccine-induceret ADE).
- Stúrt verður somuleiðis fyri, at Kovid koppingarevnið máar støðið undan immunverjuskipanini, serstakliga viðføddu immunverjuskipanini, - og serstakliga hjá børnum.
- Dr. Geert Vanden Bossche, við serkunnleika innan immunologi, virologi, vaccinologi og evolutionera biologi, er sannførdur um, at hald er ikki í niðurstøðuni, at tey ókoppsettu eru orsøk til farsóttina. Tvørturímóti



Vistfrøðiligar vanlukkur duga vit at skyna á, og tosa vit um tær nærum dagliga.

Duga vit at skyna á hví boðað varð frá einari "heilsufrøðiligari Korona flóðaldu" – og hví Kovid koppingarevnið varð mett at vera rætti verjugarðurin?

Hevur koppingarevnið hinvegin framt eina "heilsuskaðiliga flóðaldu", sum vil enda við einari menniskjaligari vanlukku?

Hví verður hesin spurningur ikki settur og umrøddur, av politisku skipanini, Heilsuverki og fjølmiðlum?

Hevur tað týdning fyri land okkara, framtíð Føroya, at 76% av føroyingum, hava fingið broytt sítt DNA við Kovid koppingarevninum, so heilsustøða teirra ikki longur er fult og heilt í egnum hondum? – og verður tað neyvan aftur!

Vit vita nú, at Spike proteinið fer inn í kyknukjarnuna, sama dag ein er vorin koppsettur, sum varð sagt ikki at vera møguligt, har stórur vandi er fyri at Spike-proteinið skerjir møguleikan fyri at framdar verða feilrættingar av DNA stronginum, sum annars fer fram støðugt, og sum er lívsneyðugt.

Vil illa til, og hendir tað sum Luc Montagnier tosaði um, kann broytta DNA'ið, "uppskriftin uppá lívið", hjá 76% av føroyingum, broyta lívsgóðskuna hjá eini fjøld av føroyingum, sum kann hava álvarsligar fylgir fyri fámentu tjóð okkara!

MMJ viðmerkingar

sær hann farsóttina sum úrslit av einari fjøldkoppseting, sum hevur havt við sær at hendan dregur út óneyðugt, samstundis sum hon tískil gerst hættislig. Somuleiðis er sannlíkt, at tey koppsettu koma at spjaða virusið, tá koppingarevnið letur virusið, sum er vorið mótstøðuført, fáa atgongd til kyknuna, og margfaldast har, samstundis sum koppingar-evnið, óbeinleiðis ger at tann smittaði ikki fær sjúkueyðkenni, og tískil gerst smittuberi uttan at varnast.

- Dr. Bossche er fullvísur í, at gjørdur er ein álvarsamur feilur, framhaldandi at fjøldkoppseta. Hann mælir til at vit gevast við tað sama, áðrenn ov seint er, og vit fáa virusfrábrigdi sum smitta alt verri og verri. Eisini vil koppingarevnið økja um møguleikan hjá virus at treingja inn í kyknurnar, og vit vilja síggja at immunverjuskipanin hjá alt fleiri borgarum verður darvað av koppsetingini.
- Dr. Bossche, leggur dent á, at tey sum veita størst íkast til fjøldmótstøðuførið, eru tey sum ikki eru koppsett, og menna tey náturligan steriliserandi immunitet. Verða øll koppsett, er eingin at menna náturligan steriliserandi immunitet, fjøldmótstøðuføri.
- Dr. Bossche biðjur bønandi, um ikki at fara undir at koppseta við nýggjum koppingarevni móti muteraðum Omicron variantum av Spike-proteininum. Tílíkt koppingarevni vil bert vera nýtiligt stutta tíð, um yvirhøvur nýtiligt, og fyrnast eftir stuttari tíð. Tað slepst ikki undan at virusstamma mennist, sum er mótstøðufør mótvegis nýggja koppingarevninum. Koppseting, við dagførdum koppingarevni, vil seinka endurreisan av náturligum immuniteti.  Dr. Bossche ber banga fyri, at Kovid koppingarevnið hevur órógvað og skatt menningina av náturligum fjøldimmuniteti. Og vil framhaldandi koppseting seinka hesa enn meira.
- Verst hugsandi gongd vil vera hon, at virusstamma mennist, sum gerst óvanliga smittandi, við øktum møguleika fyri íbornum illkynjaðum vøkstri, og við mótstøðuføri fyri teimum koppingarevnum sum nýtt verða. Tílíka støðu, vil immunverjan hjá liðugt koppsettum, við øktum møguleika fyri at virusið treingir inn í kyknurnar (vaccine-induceret ADE), ikki vera før fyri at handfara. Hetta vil eisini vera galdandi fyri immunverjuna hjá ikki koppsettum børnum.
- **Sambært teimum sum vísa á annan valmøguleika (teimum sum ikki eru sloppin til orðana alment*), so vildi samlaða talið av teimum sum orsaka av Kovid farsóttini: 1) eru løgd inn á sjúkrahús, 2) hava havt tørv á intensivari røkt, og 3) teimum sum eru deyð, frá byrjan til januar 2022, verið lægri, varð fjøldkoppseting ikki nýtt. Hinvegin skuldi verið gjørt sum lýst undir ”3. partur” omanfyri.**
- Við teimum spurningum, ivamálum, sum koma til sjóndar í hesum skrivi, sýnist tað sera viðkomandi, at sett varð ein ”**fevnandi, óheft altjóða Kovid nevnd**”, við óheftum luttakarum, við neyðugum førleikum. Dagsskrá teirra skuldi verið, á virðiligan hátt, vandaliga, uttanveltað, við skygni og alment, at lýst øll ósambærlig sjónarmið kring Kovid koppseting, í roynd at loysa ósemjur, og náa einari semju.
    - *(Hendan áheitan er send WHO tvær ferðir av Dr. Bossche, uttan at WHO hevur latið hoyrt frá sær, sí leinkjur ovast í skjalinum*)*

**5. partur – Onnur vandamál kring Kovid koppingarevnið og hjáárin**

- Umframt Dr. Geert Vanden Bossche, og hansara stúran fyri at fjølskoppseting vil menna drepara-virusstammur, at vit gera skaða á viðføddu immunskipanina, serstakliga hjá børnum, og tarna menning av fjøldimmuniteti (fjøldmótstøðuføri), so eru nógv vísindafólk og læknar sera stúrin um tey, her og nú- og langtíðarhjáárin, hjá tí einstaka.

- Hjá ungum: myocarditis (bruni í hjartavødda), pericarditis (bruni í hinnu kring hjartað).
- Hjá tilkomnum: Sveittar í blóðinum, og blóðið stadnar, sum elvir til deyða. Deyðiligar nervasjúkur.
- Í endanum á almenna skrivinum í fullari longd, eru 1077 tilvísingar, og 757 greinar í læknafrøðiligum tíðarritum, har størsti parturin er eftirkannaður av serfrøði, (peer-reviewed publikation), og restin annars send út alment. Her verður boða frá álvarsomum hjáárini av Kovid koppsetingum (#271-1028). Hetta boðar um eina skelkandi og higartil ósædda nøgd av fráboðanum um hjáárin fyri nýggjan heilivág.
- VAERS-dátur (Vaccine Adverse Event Reporting System) avdúka somuleiðis eina skelkandi nøgd av álvarsomum hjáárinum og deyðsføllum knýtt at Kovid koppingarevninum.
- Vinarliga tak støðu til um ikki er skilagott at hyggja eftir teimum 757 tilvísingum til læknafrøðiligu greinarnar.

**6. partur – Trupulleikar við Kovid PCR royndum og Kovid dátum savnaði til dagin í dag**

- Tær søgur sum eru fortaldar okkum, dátur, niðurstøður og leiðreglur, hava í stóran mun verið bygdar á Kovid PCR-royndir.
- Ein positiv Kovid PCR-roynd lýsir ikki nøktandi, um royndin veruliga er positiv, kenna vit ikki Ct/syklus markvirðið fyri royndina, sum verður staðfest sum positiv.
- Er royndin positiv fyri lágt Ct-virði (t.d. 20), so merkir tað, at stór mongd av virus er til staðar, og royndin tískil sterkt positiv. Kovid sjúku-eyðkennið kann staðfestast, og persónurin smittar illa.
- Hava vit eina Kovid PCR-roynd, har Ct-virðið er størri enn 30, so er mest sannlíkt, at vit vanliga hava eina positiva Koronaroynd, sum er følsk. Talan kann vera um lítla mongd av deyðum virus, og persónarnir hava í veruleikanum ikki havt Kovid, og um teir hava, so smitta teir ikki.
- Er ein Kovid PCR-roynd positiv, við Ct-virði hægguri enn 27, er sannlíkindi fyri at vit hava eina falska positiva roynd á 75,5%. Hægguri Ct-virðið er, hægguri er nøgdin av følskum positivum royndum.
- Tað er at harmast um, har royndin hevur verið positiv, at Ct-virðið ikki er givið sjúklinginum og læknanum.
- Sjálvt um Kovid PCR-royndin er positiv við eitt lágt Ct-virði, so ber ikki til at siga við vissu, at sjúklingurin hevur Kovid. Skal sjúklingurin hava staðfest Kovid smittu við vissu, skal tað staðfestast við ”genomisk sekventering”. Heilt frá byrjan varð staðfest, at ”genomisk sekventering” skuldi verið nýtt til staðfesting av Kovid smittu, og ikki PCR-roynd.
- At lata vísindaligu dáturnar vera eitt úrslit av Kovid PCR-royndum, har Ct-virðini og ”genomisk sekventering” ikki er partur av teimum, eru ikki nýtiligar dátur, framleiddar av CDC og State Health Departments.
- Fyri at gera ilt verri, so hava vísindaligu dáturnar, framleiddar av CDC og State Health Departments, somuleiðis hvílt á ikki nýtiligar fortreytir, tá tað snýr seg um at greina ”Kovid sjúkrahúsinnleggingar” og ”Kovid deyðsføll”.
- At nýta dátur, savnaðar á tílíkan tilvildarligan hátt, vilja hava við sær, at amerikonsku dáturnar hava lágt vísindaligt virði, við vantandi neyvleika, ófullkomnar, skulu tær greinast, - umframt at tær eru villleiðandi.
- Taka vit samanum, so er talan um vantandi vísindaligan atburð, sum hevur verið grundleggjandi trupulleikin undir allari farsóttini.

**7. partur – Hvussu munadyggt er Kovid koppingarevnið?**

- Tey (óheftu, sum ikki eru sloppin til orðana alment*) eru stúrin, og er boðskapur teirra, at Kovid koppingarevnið er ikki eins virkið og boða varð frá frá byrjan, og seinni páhald hava lýst.
- At Kovid koppingarevnið ikki hevur stórvegis virknað kemur ikki óvart á, tá koppingarevnið ikki er steriliserandi (forðar ikki fyri smittu), og einans hyggur eftir Spike-proteinum. Tá trenar tað ikki í nóg stóran mun Reglubundnu-immunverjuskipanina (lærandi immunverjuskipanina), og er til lítla ella onga hjálp fyri slímhinnuimmunskipanina. Somuleiðis kann koppingarevnið órógva vanliga immunvirksemið, skunda undir íkomu av virus frávikum, sum eru før fyri at skáka sær undan andevnunum, ment av koppingarevninum, og soleiðis gerast alt meira smittandi og deyðilig.
- Ósamsvar er um tær dátur, hvørt Kovid koppingarevnið ávirkar smittutrýstið, sjúkugongdina og deyðtíttleikan. Hetta kemur ikki óvart á, verður hugsað um, at innleiðandi klinisku royndirnar, og nógvu kanningarnar, gjørdar seinni, av virknaði av koppingarevninum, hava bygt á ivasamar vísindaligar dátur, sum líst í parti 6.
- Fleiri kanningar vísa, at Kovid koppingarevnið í veruleikanum økir møguleikan fyri Kovid smittu og Kovid deyða, tær fyrstu 5 vikurnar, eftir fyrsta prikið. Eftir tað er talan um avmarkaða vernd, í besta føri, sum ikki er varandi, vit tosa um nakrar fáar vikur ella fáar mánaðir. Eftir tað er talan um negativt árin, við øktum møguleika fyri Kovid smittu, har Boosters, einans vilja geva bráfeingis verju, sum mest sannlíkt er orsaka av stuttari, ikki málrættaðari kveikjan av natúrligu immunverjuskipanini.
- Harumframt er av røttum at óttast, at koppingarevnið økir um møguleikan, at Koronavirusið treingir inn í kyknurnar (vaccine-induceret ADE), sum kann økja um vandarnar við sjúkuni, og deyðleika. Somuleiðis er prógv fyri, at tey koppsettu eru størri smittuberi en ikki-koppsett.
- Fleiri kanningar vísa, at her og nú virknaðurin, somuleiðis langtíðarvirknið av Kovid koppingarevninum er eitt vónbrot, ikki minst fyri Koronavirus frábrigdini. Natúrligur immunitetur sýnist vera harðførari, og vara longri, enn immuniteturin Kovid koppingarevnið kann skapa.
- **Orsøkirnar, lýstar í parti 6, grundgeva fyri, at allar dátur sum viðvíkja effektiviteti av Kovid koppingarevninum, komnar frá stovnum og londum, skulu kannast nágreinuliga og tulkast við størsta varsemi. Tað er eisini galdandi fyri dátur frá Johns Hopkins, WHO, CDC og almennum heilsumyndugleikum.** Sagt bart út, orsaka av teimum tvítýddu og ivasomu háttum, Kovid dáturnar eru savnaðar, er ilt at vita hvør veruliga dygdin í verjuni av Kovid koppingarevninum er.
- **Ein savnandi, og óheft altjóða Kovid nevnd**, vildi verið gagnlig, har hendan virðismetti ósambærligu dáturnar, og kom við sínari semjusøkjandi meting av dygdini av Kovid koppingarevnunum.

**8. partur – Hvussu neyðug og vís hevur fjøldkoppsetingarherferðin verið?**

- Fjøldkoppsetingartiltakið, saman við manglandi veiting av skjótari og nøktandi ambulantari viðgerð, umframt sjúkrahúsviðgerð, hevur havt við sær, at nøgdin av sjúklingum við álvarsamari Kovid sjúku, hevur hópað seg upp (árið 2020 og 2021), umframt Kovid deyða. Hetta var ikki komið fyri, um Kovid alheimsfarsóttin varð handfarin uttan fjøldkoppseting, men ístaðin varð gjørt sum lýst undir parti 3.
- Fjøldkoppsetingin er orsøk til at farsóttin er longd óneyðugt, og vorin vandamiklari. Koppingarevnið hevur somuleiðis havt við sær nógvar sera óhepnar fylgir fyri tann einstaka.

- Av røttum er stúran og veksandi vísindalig prógv fyri, at fjøldkopp-setingin hevur verið óklók.
- Tað sum fram er farið eigur at verða viðgjørt av einari **savnandi og óheftari altjóða Kovid-nevnd**.

**9. partur – Skyldan hjá barnalæknum at veita fullgóða kunning, at byggja játtandi samtykkið á**

- Barnalæknar hava eyðskilt ikki havt tíð og orku at kanna Kovid støðuna gjølla. Tað er orsøkin til at skrivið her, við sínum nágreinuligu greiningum og 1077 tilvísingum, verður boðið fram.
- Barnalæknar eru vælkomnir at luta út almenna skrivið, so foreldur verða nøktandi kunnaði um spurningar knýttir at Kovid koppsetingini.

**10. partur – Niðurstøður**

- Vísindaliga hevur endurtikna Kovid frásøgnin, í høvuðsheitum, bygt á eina skilaleysa nýtslu av Kovid PCR-royndum, og ein hátt at savna dátur, sum má metast óálítandi, tá tosað verður um Kovid-tilburðir, innleggingar, deyða og virkni av koppsetingini.
- Skilaleys vísindalig savnan av dátum, hevur við sær skilaleysar vísindaligar niðurstøður, og tískil skilaleys politisk tiltøk.
- Hin Kovid frásøgnin, (frá óheftu vísindini, sum ikki sleppur til orðana alment *) hevur sínar grundgevingar væl rótfestar í vísindini, greinaðar og lýstar av dugnaligum, umsorgarfullum greinarum og læknum, sum hámeta samansettu og yndisligu immun-vistfrøðiskipanina. Hesi hava halgað alla sína yrkisleið, á trúfastan hátt, at menna og nýta lívbjargandi koppingarevnir, og hava nýtt seinastu 22 mánaðirnar at greina Kovid støðuna. Hesi eru ikki "anti-vaxxarir." Tvørturímóti mæla tey avgjørt til at koppingarevnir verða nýtt. Tó skal koppingarevnið vera prógvað sum trygt, virkið og neyðugt.
- Sambært teimum sum ikki sleppa til orðana, er Kovid koppingarevnið ikki nóg trygt at taka, virknaðurin ikki nøktandi, og hevur koppingarevnið gjørt størri skaða enn gagn.
- Fjøldkoppseting, har nýtt verður eitt ikki-steriliserandi (suboptimalt) koppingarevni, hevur longt um farsóttina, skapt frábrigdi sum smitta verri, og økt um vandan fyri deyðleika. Hetta er vorið orsøk til at tann koppsetti er vorin viðkvæmur fyri lívshættisligum ADE, og gjørt hendan til ógvusligan smittubera, tá immunverjan er vorin órógvað, serstakliga viðfødda immunverjan hjá børnum. Fjøldkoppsetingin hevur verið ein foring fyri møguleikanum, at menna fjøldmótstøðuføri har farsóttin kundi verið fjarðað burtur. Úrslitið er fleiri deyðsføll og sjúkrahús-innleggingar, enn um Kovid farsóttin var handfarin uttan fjøldkoppseting.
- Her hevur ongantíð verið talan um eina "alheimsfarsótt sum skildast tey ókoppsettu". Talan hevur verið um eina alheimsfarsótt, sum er vorin longd og gjørd vandamiklari, orsaka av einari illa umhugsaðari fjøldkoppseting.
- Umframt at vera eitt sera ivasamt átak móti fjøldini, hevur Kovid koppingarevnið í fleiri førum givið tí einstaka lívshættisligt hjáárin.
- Eisini hevur Kovid koppingarevnið verið ógvuliga lítið virkið, í mun til fráboðaninar frá framleiðara og CDC. Í besta føri hevur talan verið um hissini fyrimunir, tó hesir mugu metast sera ivasamir.
- Vandarnir, knýttir at Kovid koppsetingini, bæði fyri fjøldina og tann einstaka, sýnast greitt at viga upp ímóti teimum møguligu fyrimunum hon skuldi givið. Hetta er serstakliga galdandi fyri børn, men eisini fyri gomul og veik.

- Undir farsóttini hava tey smittaðu mest sum ikki fingið skjóta ambulanta viðgerð. Hetta hevur verið orsøk til sjúkrahúsinnleggingar og deyðsføll, sum vit kundu verið sloppin undan.
- Kovid koppingarevnið hevur ikki verið lýst nøktandi, so til ber at siga at samtykkið er bygt á fullgóða kunning. Hvørki almenningurin ella foreldur hava fingið nøktandi kunning, frá forsprákarum fyri Kovid koppingarátakið. Eingin kunning hevur verið um hjáárin fyri tann einstaka, og eingin hevur kunna um óhepnu fylgirnar við fjøldkoppseting (undir alheimsfarsótt, við koppingarevni sum ikki forðar fyri smittu *). Ístaðin hevur kunningin verið einføld og eintáttað, har givin er ein falskur tryggleiki. Hinvegin er óhefta serfrøðin, sum hevur ein boðskap at bera, sum byggir á vísindi og dátur, og lýst í rúgvismikla skrivinum (sí leinkju omanfyri), ikki sloppin til orðana, og lýst at bera villleiðandi kunning.
- ***Foreldur og almenningurin hevur uppiborðið, at umboð fyri tær tvær Kovid áskoðaninar ("koppset teg" og "steðga koppsetingar-herferðini"), seta seg saman at røða um, á siðuligan hátt, á visindaligum støði, og alment (beinleiðis fjølmiðlasending), um evnini, samskifti og trygd, hvat hevur virknið verið, um koppsetingin hevur verið átrokandi neyðug, hvat er úrslitið, og um skilvísið aftanfyri Kovid fjøldkoppsetingina. Í 22 mánaðir hevur leiðandi óhefta serfrøðin ("aftanfyri steðga koppsetingarherferðini") inniliga bønað um samstarv, tó alt til onga nyttu.***
- Foreldur og almenningurin kann og eigur at halda fast í, at ein "fevnandi óheft altjóða Kovid nevnd" verður skipað, mannað við fremstu vísindafólkum, sum gjølla og óheft viðgerða Kovid koppingar-avbjóðingarnar, í eini roynd at lýsa ósemjurnar, og finna semju um eina felags niðurstøðu. Hetta er siðvenjan millum vísindi, læknafrøði, demokrati og borgarasamfelagið. Almenningurin hevur uppiborið og stóran tørv á at kanning verður gjørd við nærlagni og á skynsaman hátt. Tørvur er á at vit øll fáa lagt lok á Kovid alheimsfarsóttina á semjusøkjandi hátt.
- Inntil omafyri nevda semja kann verða nádd á altjóða støði, er av størsta týdningi at verandi fjøldkoppseting fyribils verður steðgað, í øllum føri fyri børnini.
- Foreldur hava tørv á, og kunnu krevja, at fáa partleysa og fullkomna kunning, skulu tey taka støðu til frama fyri barn sítt. Tí hava tey tørv á kunning frá teimum sum hava neyðuga førleikan, og har kunningin er vísindalig, reiðilig og vís.
- Sum barnalækni, pápi og abbi, føli eg tað neyðugt at verja immun-verjuskipanina hjá børnum okkara, og verja mannaættina móti teimum negativu avleiðingum sum fjøldkoppseting kann hava við sær. Tí hetta almenna skriv.
- Til frama fyri børn og barnabørn okkara og mannaættina sum heild, hava vit sum einstaklingar ábyrgd av at mæla til at Kovid koppsetingarherferðin verður steðgað her og nú, áleinað av vísindaligum orsøkum, til ein Kovid nevnd kann greina Kovid 19 støðuna neyvari. Hinvegin vil ein framhaldandi koppingarherferð fremja skaða á børn okkara og mannaættina sum heild.
- Moralskt, etiskt og vísindaliga hava vit eina sosiala ábyrgd at spyrja inn til ein steðg av Kovid koppingarherferðini. Ein tílík støðutakan er ikki ein sjálvsøkin støðutakan, men rótfest í vísindi og at vera sosialt tilvitaður. Hvørt tú eru ókoppsettur ella koppsettur, kanst tú trygt stuðla undir hesa áheitan, sum vil vera til fyrimuns fyri øll, sosialt og heilsuliga.

*) Viðmerking MMJ
Umsett MMJ